UTTAN ÚR HEIMI

### Teir seku sleppa undan revsing

– Maður mín fekk boð um gera tað, sum hann gjørdi. Hann helt, at tað snúði seg um landsins trygd, sigur Martha Frederick, sum er gift við einum av teimum seks amerikonsku hermonnunum, sum nú eru skuldsettir fyri at hava farið illa við irakskum fangum.

Martha Frederick heldur, at teir seks hermenninir eru syndabukkar, og at amerikonsku myndugleikarnir verja teir yvirmenninar og fregnartænastumenninar, sum góvu hermonnunum boð. Hon sigur, at tá maður hennara spurdi, um teir skuldu fara soleiðis við fangunum, varð svarið, at soleiðis vildi tann hernaðarliga fregnartænastan hava, at fangarnir skuldu viðfarast.

– Teir, sum hava ábyrgdina, standa væl fjaldir og hyggja at, meðan maður mín og hinir verða revsaðir. Hetta er sum at vera finna í einum talvi, sigur Martha Frederick við sjónvarpið NBC. Tað var NBC, sum almannakunngjørdi myndirnar úr fongslinum í Bagdad.

### Áskoðarar skulu hjálpa

Bretsku myndugleikarnir hava gjørt av at leita sær hjálp frá teimum mongu, sum hvønn einasta dag standa uttan fyri girðingina kring Heathrow-floghavnina í London, har tey hyggja at teimum nógvu flogførunum, sum koma og fara.

Ein talsmaður hjá løgregluni í London sigur, at áskoðararnir uttan fyri Heathrow hyggja at øllum og leggja merki til alt, og tí kann teirra forvitni koma løgregluni væl við í bardaganum ímóti yvirgangi, heldur hann. Felagið hjá flogáskoðarunum tekur undir við tiltakinum, og tað ger felagið, sum stendur fyri trygdini í Heathrow, eisini, sigur BBC.

Áskoðararnir skulu serliga halda eygað við, at girðingin rundan um ta stóru floghavnina er í lagi, og teir skulu varskógva løgregluna, um teir halda seg hava sæð okkurt illgrunasamt. Flogáskoðararnir hava ongan myndugleika, men teir hava fingið eitt serligt samleikaprógv, sigur sigur, hvørji tey eru, og hvørji ørindi tey hava við floghavnina.

### Mótstøðan harðnar

Bretski hernaðarserfrøðingurin Jeremy Binnie vísir aftur amerikonsku frásagnunum um, at útlendskir yvirgangsmenn skipa fyri teirri áhaldandi mótstøðuni í Irak.

Jeremy Binnie vísir á, at 90 prosent av mótstøðumonnunum í býnum Falluja eru irakar. Tað hava amerikanskir hernaðarleiðarar sjálvir sagt, sigur hann. Harafturat hevur tað víst seg, at av teimum 8.000 irakunum, sum amerikanarar og bretar hava tikið, eru bara 127 útlendingar.

Bretski hernaðarserfrøðingurin vísir eisini á kanningina, sum USA Today gjørdi í síðstu viku, og sum vísti, at tveir triðingar av teimum 3.500 spurdu irakunum halda, at innrásin hevur gjørt viðurskiftini betri, enn tey vóru undir Saddam Hussein. 57 prosent svaraðu, at tey vilja hava hersetingarvaldið av landinum sum skjótast, og 71 prosent søgdu, at í teirra eygum eru teir útlendsku hermenninir komnir at herseta Irak heldur enn at fríia tað.

### Jagstraðu norskt flogfar

Seinasta leygardag jagstraðu tvey niðurlendsk F16-jagaraflogfør eitt norskt leiguflogfar, sum var á veg suðureftir við ferðafólki.

Niðurlendskir fjølmiðlar hava gjørt nógv burtur úr tilburðinum. Sagt verður, at tað norska flogfarið hevði ikki givið seg til kennar, tá tað kom í niðurlendskt loftrúm, og at hetta fekk myndugleikarnar at stúra fyri, at talan kundi vera um eina yvirgangsatsókn. Tí vórðu tvey jagaraflogfør send avstað, men hóast tey fleiri ferðir royndu at fáa samband við norska flogfarið, svaraði tað ikki.

Niðurlendsku fjølmiðlarnir siga, at tey bæði F16-jagaraflogførini vóru vápnaði og vóru til reiðar at skjóta tað norska leiguflogfarið niður. Sambært blaðnum VG er tað framvegis ógreitt, hví tað norska flogfarið ikki lat við seg koma.

# Hann er særdur! Skjót hann!

**Samstundis sum amerikanarar viðganga, at amerikanskir hermenn myrdu tveir irakskar fangar, verða nýggjar ræðusøgur frá krígnum avdúkaðar**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrakvøldið vísti franska sjónvarpið Canal Plus eina videoupptøku frá einum amerikonskum álopi í Irak tann 1. desember í fjør. Upptøkan vísir tríggjar irakar, sum verða álopnir av einari amerikanskari tyrlu. Amerikanararnir biðja teir tríggjar menninar steðga, men tá teir sýta fyri at gera eftir boðunum, verða tveir teirra skotnir.

Tann triði irakin leitar sær skjól undir bilinum, men menninir í tyrluni fáa eygað á hann, og teir skjóta eftir bilinum. Lítla løtu seinni krýpur irakin undan bilinum og er sjónliga særdur. Síðani hoyrast tveir av amerikonsku hermonnunum:

*– Hann er særdur.*
*– Skjót hann!*
*– Eg taki meg fram.*
*– Skjót hann!*
*– Í lagi.*

Franski advokaturin Patrick Budouin sigur við tíðindastovuna AFP, at tað er krígsbrotsverk at drepa ein særdan fígginda.



*Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri: -Tað, sum hasir hermenninir hava gjørt, er andstyggiligt og óamerikanskt*

*Mynd: Reuters*

### Eisini morð

Samstundis sum alt fleiri ræðusøgur frættast frá krígnum í Irak, hava amerikanarar viðgingið, at amerikanskir hermenn hava myrt tveir irakskar fangar í einum fongsli í Irak. Sagt verður eisini, at fleiri onnur líknandi mál verða kannað.

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, legði á einum tíðindafundi fyrrakvøldið dent á, at tað eru bara nakrir fáir amerikanskir hermenn, sum hava framt tey nógv umrøddu brotsverkini. Hann segði, at tað, sum er hent, er andstyggiligt, og at teir seku verða revsaðir.

## USA skal rinda endurgjald fyri eiturálop hjá Saddam

**Í krígnum í áttatiárunum nýttu irakar eiturgass ímóti iranum. Nú krevja nakrir iranar endurgjald frá USA, tí amerikanskar fyritøkur hjálptu Saddam Hussein at gera eiturgassið**

ENDURGJALD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nú verður USA kravt eftir endurgjaldi fyri skaða, sum hópoyðingarvápn hjá Saddam Hussein forvoldu í krígnum ímillum Irak og Iran frá 1981 til 1988.

Ein iranskur dómstólur hevur gjørt av, at amerikanarar høvdu medábyrgd, tá irakski herurin nýtti eiturgass í einum álopi á iranska býin Sardasht. Nógv fólk doyðu, og fleiri fingu varandi mein av gassinum, og tað eru hesi, sum nú krevja USA eftir endurgjaldi. Kravið er 550 milliónir krónur, og tað varð í gjár handað amerikonsku sendistovuni í Sveits.

Iranararnir siga, at undir krígnum ímillum Irak og Iran skrivaðu amerikonsku myndugleikarnir 780 útflutningsloyvi, sum loyvdu amerikonskum fyritøkum at selja irakum ymisk vápn umframt tilfar til lívfrøðilig og evnafrøðilig hópoyðingarvápn.

Skjøl, sum blaðið The Washington Post hevur almannakunngjørt, stuðla upp undir iranska kravið. Í teimum sæst, at stjórnin hjá Ronald Reagan, forseta gjørdi einki fyri at steðga útflutninginum, sjálvt um stjórnin tann 1. november í 1983 fekk at vita frá CIA, at irakski herurin nýtti eiturgass at kalla hvønn dag í krígnum við Iran. Skjølini avdúka eisini, at amerikanararnir hjálptu Saddam Hussein við upplýsingum frá fylgisveinamyndum, hvørja ferð iranski herurin flutti herfólk ella stríðsútgerð á hermótinum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Annika Mittún Jacobsen:

## Nýggjur menningarleiðari í Føroya Sparikassa

Annika Mittún Jacobsen byrjar tann 1. juni sum nýggjur menningarleiðari í Føroya Sparikassa.

Talan er um eitt nýtt starv á einari nýggjari deild. Menningardeildin er ein samanrenning av KT-deildini og fyrisitingardeildini, og kemur hartil at hava ábyrgd av produktmenning.

Annika Mittún Jacobsen hevur útbúgving sum cand.



merc. dat. og hevur seinastu uml. 6 árini arbeitt hjá finsku tryggingarfyritøkuni Pohjolan Systeemipalvelu. Seinastu tvey árini hevur hon verið projektleiðari og samskipari innan KT-menning og KT-bygnað.

Umframt hetta hevur Annika arbeitt sum KT-ráðgevi og systemútviklari hjá FDB-data og WM-data í Keypmannahavn. Í Føroyum hevur hon starvast hjá táverandi Tryggingarsambandi Føroya og á Elektron.

Annika er 39 ára gomul og gift við Tapio Peltonen. Tey eiga tvey børn, 2 og 4 ára gomul.

## Anna Mohr hevur 45 ára starvsdag

**45 ára starvsdagur er met innanfyri Tryggingarfelagið Føroyar, og tað metið eigur Anna Mohr. Metið varð sett í farnu viku tann fyrsta dagin í mai mánaði. Anna Mohr byrjaði sum 18 ára gomul í starvi felagnum, sum í dag eitur Tryggingarfelagið Føroyar**



NØVN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Anna Mohr er ættað av Eiði, og hon er dóttir Elisu og Eliesar Hammer. Anna er fødd tann 12. september í 1940, og hon er uppvaksin á Eiði, har hon gekk í barnaskúla til sjeynda flokk. Liðug í sjeynda flokki velir Anna at flyta til Havnar, eftir at hon hevur arbeitt við onkrum smávegis norðuri á Eiði.

Komin suður til Havnar byrjar Anna í starvi hjá Smæruni, meðan hon gongur á handisskúla um kvøldarnar. Eftir stutta tíð verður hon umbiðin í Føroya Brunatrygging, tá stjórin har, Jørmund Thorsteinsson, av sínum eintingum bjóðar henni starv. Anna tekur av beinanvegin, og hon er starvsfólk nummar trý hjá Føroya Brunatrygging. Árið er 1959, og Anna Mohr er 18 ára gomul.

Í dag er Anna Mohr vorðin 45 ár eldri, og hon arbeiðir enn á sama felagi, sum í dag eitur Tryggingarfelagið Føroya. Tað einasta tíðarskeiðið, har Anna hevur verið burtur frá sínum arbeiði, hevur verið undir barsilstíðini. Umframt tað er 45 ára starvsdagur hennara met á Tryggingarfelagnum Føroyar.

Tey seinastu nógvu árini hevur hon arbeitt innanfyri skaðar. Tá hon byrjaði, kallaðist felagið Føroya Brunatrygging, sum helt til úti í Tinganesi. Men sama ár, í 1959, verður virksemið hjá felagnum flutt út á Kongbrúnna. Átta ár seinnu var flyting aftur á skránni, og hesaferð skal felagið hjá Onnu Mohr húsast á Glade Hjørn. Aftaná 11 ár á Glade Hjørn verður Føroya Brunatrygging flutt til Jóannesar Patursonar gøtu, og Anna Mohr fylgir við. Og síðani 1984 húsaðist Føroya Brunatrygging uppi á Hálsi, men nú í 2004 samlaðist virksemið aftur á Kongabrúnni, júst sum í 1959, tá Anna av fyrstan tíð kom til felagið.

Í 1998 løgdu Tryggingarsambandið, Føroya Vanlukkutrygging, og Føroya Brunatryggin saman. Samlaða virksemið eitur nú Tryggingarfelagið Føroyar, har Anna Mohr hevur starvast í 45 ár.

- Mær hevur altíð dámt sera væl her. Eg havi ongantíð hugsað um at farið nakra aðrastaðni. Hetta staðið hevur altíð verið sum ein stór familjan, sigur Anna Mohr, sum er sera fegin um starvið á Tryggingarfelagnum Føroyar og umhvørvið á Kongabrúnni.

Anna Mohr er gift við Inga Mohr. Tey eiga trý børn: Unn er júst fylt 44 ár, og hon arbeiðir í forskúlanum hjá nonnunum; Gunnar er føddur í 1967, og hann er timburmaður; og Guðrið er fødd í 1971 og arbeiðir sum jarðarmóðir í Danmark. Børnini hjá Onnu og Inga Mohr eiga øll trý børn, og tískil hava Anna og Ingi níggju ommu- og abbabørn tilsamans.

Anna Mohr og Ingi Mohr búgva í dag á Sundsvegnum yvirav Norðurlandahúsinum.



## Leon Gunnar Johannesen

**14. november 1988 22. mars 2004**

*Saknin sára vit nú kenna,*
*tómur sessur tín er nú,*
*eftir kinnum tár nú renna,*
*aldrin gloymdur verður tú.*

*Sum ein rósa - vakur var tú,*
*lætta lyndið gleði bar.*
*Eins og her - so blómar tú nú,*
*Gud hann goymir teg hjá sær.*

*Sorgin nívir sál og sinn,*
*boygd av sorg vit eftir sita,*
*Gud hann tók teg til sín inn,*
*á, ein troyst tað er at vita.*

*Hvíl í friði, kæri skattur,*
*heima í Guds himna stað,*
*ein dag møtast vit tó aftur,*
*Gud hann hevur lovað tað.*

*Kæra barnið vit tær siga*
*nú farvæl á síðstu ferð,*
*og av hjarta Gud vit biðja*
*Troyst og ugga til os ber.*

**Fastir**

### Dagurin

**6. mai. Jóhannes fyri borgliði** (Johannes ante portam). Dagurin hildin til minnis um at ápostulin Jóhannes varð illa píndur uttan fyri borgliðið Porta Latina í Róm. Hann komst undan, men varð seinni rikin í útlegd út á oynna Patmos.

*Jóhannes Patursson varð føddur hendan dagin í 1866, og Hans Andrias Djurhuus doyði hendan dagin í 1951.*

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Niclas Petur D. Niclassen**

ættaður av Velbastað, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 2. mai, 73 ára gamal.

Jarðarferðin verður hósdagin 6. mai úr Vesturkirkjuni kl. 13.00.

**Kona, synir og svigardøtur,**
**Tina, Ann-Bjørg, Niclas Petur, Jóhanna og Svend**